## 8. og seinasti partur hjá Andrias í Tarti:

# Húsingin uppi á landi

**Samrøða**


**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

**Nú eru vit komin til seinasta part av lívssøguni hjá Andrias í Tarti. Hann byrjar við at greiða meira frá húsingini á landi, sum eisini var munandi øðrvísi enn í dag. Seinast greiddi hann frá, tá hann sigldi við "Álaker". Nú heldur hann áfram við at greiða frá sínum lívi sum fiskimaður aftaná "Álaker". Hann fer at rógva út og gerst egningarformaður á landi. Sjónum sleppur hann ikki heilt fyrr enn í 1991, tá hann gongur á 85. ári!**



*Hendan myndin er frá einum royndartúri hjá skipasmiðjuni. Uttast t.h. er Kjartan Mohr, sum var reiðarí á Álaker. Næstur honum er Søren Pram Sørensen, sum eisini var við "Álaker". Hann var ein "deiligur drongur" sigur Andrias. Uttast t.v. Alfred Jacobsen ein av okkara kendu sjómonnum. Tað verða fleiri myndir frá teimum á Skipasmiðjuni í komandi parti.*

Sum rímiligt er høvdu skipsmenn eisini eitt lív á landi, og her var tað ikki minsta arbeiðið, sum skuldi gerast. Peningurin var lítil, og tað ráddi um at fáa so nógv burtur úr tí, sum kundi lætta um húsarhaldið.

### Arvurin

Eitt dømi um hetta er, at undir fyrra kríggi arvaðu mamma og pápi 80 krónur. Hetta bar soleiðis til: Ein gomul genta hevði sett nakrar dálar inn í Sparikassan, tá hann var stovnaður. Um lýst var í Dimmalætting eftir avvarandi hjá henni, ella hvussu hetta kom út, er óvíst, men tað var Petur Kristian Joensen við Gjógv, trímenningur mín, sum hevði víst á foreldur míni og sagt, at bæði vóru í ætt við hana, ið átti sparikassabókina. Sum rímiligt er, kom hetta væl við hjá okkum, og tað mundi Petur Kristian eisini vita.

### Stríðið at fáa gerði

Sum eg havi nevnt fyrr, áttu vit onga jørð sjálvi. Seinast í 20-ununum vóru tað fleiri, sum ikki áttu nakra trøð, og var pápi ein teirra. Nú biðja vit um at fáa eitt gerði innanfyri Garðar. Men hetta var ikki sum at siga tað, tí gerðini máttu fáast frá øðrum, helst bóndur, sum høvdu jørðina um hendur. Vit máttu hava sakførarar fyri okkum, og tað kostaði 180 kr. fyri hvørt av teimum níggju gerðunum. Vit fingu tey tá til endan.

Eg minnist ikki, um tað var lutakast sum gjørdi, hvat gerði hvør skuldi hava, men eg fekk tað ringasta av øllum, vit sum einki áttu frammanundan! Okkara gerði kallast inni á Rættargjógv. Tað var eisini ov lítið. Tað skuldi vera 10.165 fermetrar, men tað var ikki meira enn 9.000, tí ein geiri av vegi fór burturav.

Vit velta nú tað fyrsta árið niðanfyri vegin, sum gekk gjøgnum gerðið. Vit veltu alt í einum, og eg minnist, at tað fóru tríggjar tunnur niður í. Tástani fekk eg at vita, hvat tað var at eiga eplir. Veltan var 900 fermetur, og tað var grunt. Pápi saksaði og setti eplini niður. Taðingin fyrsta árið, sum var eftir vártíð, var at skera tara. Vit skóru á stórari fjøru, tá tarin kom undan. Tað var so forferdiliga nógvur tari. Vit førdu hann við báti inn á Rættargjógv, løgdu at á Veðurlambshellu og bóru so taran niðan, men tað var tó stutt at bera.

Vit fingu í miðal øll árini eini fimm fold. Eg minnist nakrar teigar, har vit fingu sjey fold burturúr. Her er ikki so góður sólargangur, sólin fer so tíðliga burtur.

Pápi hevði tað mestu æruna av, at so frægt kom burtur úr, og so vóru vit tríggir og viðhvørt fýra brøður, sum hjálptu honum. Vit veltu nógv og komu næstan niðan undir hegnið.

Vit fingu 24 tunnur upp aftur av seks tunnum, sum var fýra fold. Vanliga var tað gott, tá tað vóru fimm fold. Mamma plagdi at kóka eina heila spann av eplum hvørja ferð, tí tað var til kríatúrini eisini, tey livdu eisini av tí. Vit høvdu nokk av eplum, tað var so deiligt.

### Setepli

Onkur søga er um, hvussu nógv kundi fáast burtur úr einum setepli. Umleið 1930 hevði Harald Gaard fingið hendur á einum hollendskum setepli. Tað hevði so nógvar munnar (spírar), so hann skar tað nógvar ferðir sundur, áðrenn hann setti tað niður. Hann fekk 180 epli upp aftur. Eg meini, at Jóan Pauli Thomsen, handilsmaðurin, hevði sett tað í bløðini. Dóttir Harald er granni hjá okkum, hon gongur á 80. ári, og hon minnist til tað.

### Hoyggjaði í kava fyri triðing

Her er eitt annað dømi um, hvussu vit royndu at húsast.

Vit koma heim úr Íslandi fyrst í oktober eitt ár fyrst í 30-unum. Har stóð nógv gras ósligið. Ein part av hesum átti Klæmint Klein, sum hevði eina mørk av Stórustovufestinum. Hann hevði kúgv, og hann hevði ta jørðina inni við Garðamørk omanfyri Rinkusteinar. Tað var so nógv útliðið, og nú fara vit at hoyggja fyri triðing, t.v.s. at vit fingu ein triðing av hoynum, sum vit fingu til sættis. Eg minnist, at tá vit høvdu fingið tað saman til sátubørn, kom kavi, og sátubørnini kavaðu partvís undir. Vit funnu uppá at bera hoyggið á neystaloftið. So gjørdu vit snórar, hongdu grasið uppá teir og turkaðu tað inni. So væl eydnaðist hetta, at vit keyptu fýra veðragjólingar hetta árið. Vit bestiltu fýra sekkir av mais til ískoytisfóður. Teir kostaðu 10 kr. sekkurin. Tá kundi ein bestilla mjøl og sukur og mais frá eini heilsølu niðri.

Veðragjólingarnir fingu ein sekk í part, og hoyggið var bara til jótur. Teir vóru í góðum standi, tá teir fóru út um várið. Tá høvdu vit ikki nógv pláss til seyð. Vit høvdu bert pláss til ein seyð í kjallaranum í Tarti. Tríggir stóðu niðri í neystinum frammanfyri bátin. Pápi passaði teir væl og bar teimum eisini vatn bæði morgun og kvøld. Tá tað kemur út á heystið, sigur Dánjal á Bakka, hann var røktingarmaður í Vaðhorni, at hann væntaði ikki tann eina av gjólingunum fara at koma fram á heystið. Hann



*Íslendski flekjarin fekk ikki køvt Jógvan Poulsen, sum her sæst saman við konuni Janu.*